





## FØROYSKAR SØGUR 1 & 2

**Tín, foreldranna og forfedranna søga í livandi myndum**

Útvið fýra tímar við hugvekjandi, rørandi og undirhaldandi filmskutum, ið siga tína, foreldranna og forfedranna søgu.

Føroyskar Søgur-filmsfløgurnar eru eitt einastandandi innlit í, hvussu føroyingar hava livað og virkað seinastu hundrað árini, bæði tá tað gekk undan og ímóti.

Stórar og smáar søgur úr gerandisdegnum, síðan filmsmiðilin varð uppfunnin. Kilometrar av filmsrullum við upptøkum eru leitaðar fram undan vaðingini hjá vanligum fólkum, úr goymslum og søvnum.

Her er m.a. kongavitjanin í 1907, fótbóltdystur millum TB og HB á Sevmýri í 1926 og fólkafundur á Gøtueiði í juni 1930. Harðførir føroyingar fara til Grønlands á útróður í 1939. Tú sært bretsku hersetingina stríðsárini og fyrstu royndirnar við fastari flúgving millum Føroyar og umheimin í 1946. Hvalastingarin Heykur fer á veiðu í 1949, fólk fara á ólavsøku í 1959, vit eru við til mótasýning við eggjandi undirklæðum á Hotel Føroyum í 1966.

Føroyskar Søgur er ein hugvekjandi og undirhaldandi jólagáva til alla familjuna.

**1'arin**

*Ársins veitsla / "Tjaldur" - Lívlínan til umheimin / Løðið kanónina - Nebbafiskur í eygsjón / Føroyska himmiríki hermanna / Aftur á slóðina / Frá træslupp til stáltrolara / Heimsins nalvi / Kongligt stórvask / Síðsti kornakurin/ "Undirklæði, nei takk!" / Við skipstroyggjuni í mastrini / Føroyar - Færøerne*

**2'arin**

*"Gymnastikk", bóltspæl og tílíkt / Við biðum á baki / Teir taka land / "Mesters hemmelighed" / Vagar Airport / Lívsins mjólk / Frá bygd til bý / Frá leypi til lastbil / Føroyar vaksa / Ein nýggj byrjan / Tá leikur verður álvara / Allar snildir loyvdar / Ein uppliving fyri lívið / Garðurin eitur "Víkagarður" / Føroyar í dag*

**www.foroyskarsogur.fo**

Føroyskar Søgur eru framleiddar í samstarvi við Eik Grunnin

substanz Eik